## DAGSINS MEINING

# Órímulig gjøld

Tað er ikki løgið, at summir arbeiðsgevarar ilskast, nú Toll og Skattstovanhevur sent út tað fyrsta kravið eftir gjaldi til ta nýggjubarnsburðarskipanina. Fíggjarmálastýrið fylgir hugburðinum hjá peningastovnunum og ásetir eitt avgreiðslugjald. Tað er ikki symbolskt, men kemur heldur undir hugtakið okur.

Er talan um eitt stórt virki og stórar flytingar eru 100 krónur ikki nógv, men er talan um eitt lítið virki og smáar flytingar eru 100 krónur nógv. Í summum førum er avgreiðslugjaldið heilt láturligt, sum Sosialurin vísti eitt dømi um ígjár. Ein arbeiðsgevari skuldi flyta 1 krónu til skipanina, men skuldi gjalda 100 krónur í avgreiðslugjaldi. Hetta hoyrir sjálvandi til tey sjáldsomu dømini, men sigur nakað um tað láturliga í gjaldinum.

Seinastu árini hevur hugburðurin verið tann, at fólk skulu gjalda alt meiri og meiri. Vit flyta okkum frá tí, sum skandinavisku londini hava kallað “gratisprinsippið”, frá nøkrum sum er fíggjað umvegis skattin, til eina skipan, eina samfelagsskipan, har brúkarin skal gjalda fyri tænastur. Tað er í lagi, at vit gjalda fyri summar tænastur, men vit mugu ansa eftir, at hesi avgjøld ikki venda tann tunga endan niður, og eru til ampa hjá pensjónistum og teimum lægru inntøkubólkunum.

At Fíggjarmálastýrið kemur við hesum, kemur ikki óvart á. Hetta stýrið umsitur eisini skattin, og hevur ábyrgdina av tí órimiligu skipan, at skalt tú gjalda ein eykaskatt, tí tú hevur goldið ov lítið árið fyri, skal tú gjalda nøkur prosent í sektargjaldi. Væl at merkja, um tú ikki sjálvur ella sjálv hevði roknað skattin út. Men hvussu nógv duga tað? Øvugt,fær tú nøkur prosent, um tu hevur goldið ov nógv. Ein stak tápulig skipan!

Hjá peningastovnunum er gongdin tann sama, og nú skal gjaldast fyri allar flytingar. Fyri nøkrum árum síðani bjóðaðu peningastovnarnir tær at flyta gjøgnum peningastovnarnar. Ja, tú vart nærmast biðin um at gera tað, og fáa tær eina heildarkonto til allar hesar flytingarnar. Tað var so lætt og so kostaði tað einki, men nú verða fleir krónur tiknar í ómakagjaldi fyri nakað, sum upprunaliga skuldi vera ein tænastuveiting til viðskiftafólkini. Slíkt kallast bóndafangarí. Tað sigst, at hetta verður gjørt fyri at skunda undir fólk, so tey fara brúka skipanina við heimagreiðslu. Men neyvan fara pensjónistar ella tey lágløntu til slíkar skipanir. V.ø.o. vendir eisini nýggi politikkurin hjá peningastovnunum tunga endan niður!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eftirlønir og lógarfusk

**Eilif Samuelsen**



Tað var ein funnin fressur, tá ið Útvarp Føroya setti ljóskastaran á málið um eftirlønina hjá landsstýrismonnum og lat skína ígjøgnum, at á nýggjárinum komandi fóru allir landsstýrismenn og løgmenn heilt aftur til 1951 at fáa knappar 26.000 kr. um mánaðin í eftirløn, um teir høvdu verið landsstýrismenn í minst eitt ár.

Sum vera man var hetta sum at tendra í turt krút. Øll tey, sum ikki nær náminda vinna sær hesa upphædd í strævna gerandisstríðinum, argaðust inn á sálina av hesum tíðindum, og hvat munnu pensionistarnir og onnur láglønarfólk so ikki hava hildið?

Síðani hava allir fjølmiðlarnir roynt at gera sær dælt av fressinum. Men eingin hevur gjørt sær tann ómak at rætta tann órímuliga pástandin um tær 26 túsund krónurnar, tíansheldur sakliga at upplýsa, hvat veruleikin er um málið. Tann frægasta royndin var gjørd í Sosialinum 21. juli, men tann royndin varð spilt av, at eisini har skuldi lifrast fyri teimum, sum av góðum grundum vóru djúpt forargað inn á luksusdýrini, sum fingu líka stóra pensión sum Brimil kostaði. Ei undur í at fleiri túsund mótmælisundirskriftir verða handaðar landsstýrinum.

Hetta málið er eitt skúladømi um, at føroyska pressan, so at siga øll sum hon er, hevur svikið sína moralsku og etisku skyldu móti samfelagnum og ímóti borgarunum við ikki aktivt at upplýsa heiðurligt um málið, men heldur passivt at lata órímiligleikarnar hanga og darra í luftini.

**Landsstýrið syndarin**

Tað endaliga úrslitið av lógaruppskotinum um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. var einki minni enn ein vanlukka, eitt lógarbrongl av allar ringasta slag.

Tað er varaløgmaður, ið sum uppskotsstillari hevur ábyrgdina av, at hetta býtisbarnið kom til verðina. Hann átti, tá ið hann sá, hvat tað útviklaði seg til, at havt tikið málið aftur, áðrenn tað kom til atkvøðugreiðslu við 3. viðgerð. Harvið hevði hann eisini tikið eitt tað besta prógvið úr hondunum á teimum, sum siga, at hetta landið verður stýrt eftir bestu bananprinsippum.

Tað er eingin, sum hevur nakað ímóti, at løgtingsmenn, løgmenn og landsstýrismenn fáa eina rímiliga lønar- og eftirlønarskipan, men tá ið tað verður gjørt, so eigur tað at verða eftir nágreiniligum og kvalifiseraðum forarbeiði.

Tann arbeiðsbólkurin, sum í mai í fjør ummælti eftirlønarskipanina hjá landsstýrismonnum sigur í sínum tilmæli m.a.: ”Arbeiðsbólkurin er samdur í, at eftirlønarviðurskiftini hjá landsstýrislimum eiga at verða ásett eftir sama leisti sum fyri løgtingslimir. Samstundis er arbeiðsbólkurin sannførdur um, at rætt er at viðgera allar ásetingar í lógini samstundis. Tí verður mælt til, at øll skipanin við samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrislimir verður viðgjørd samstundis, og møguliga saman við samsýningar- og eftirlønarviðurskiftunum hjá løgtingslimum, tó so at meginreglurnar í tænastumannaskipanini verða varðveittar.”

Fyrsta lógin um samsýning v.m. til landsstýrismenn kom í 1948. Síðan hevur málið sum vera man útviklað seg við at broytingar og ískoyti fleiri ferðir hava verið gjørd. Nógv ber brá av at hava verið pjøss. Nú hálvthundrað ár eftir átti eitt fullfíggjað lógarverk at verið gjørt og gjørt so mikið væl, at tað slapp undan at verða skammfarið, tá ið tað kom í løgtingið.

**Pilatus umaftur**

Fleiri tingfólk hava verið frammi í miðlunum og tváað sínar hendur. Tað hevur verið pínligt at síggja og hoyra. Serliga undanførslurnar og plianin hjá formanninum í Sjálvstýrisflokkinum, sum annars hevur gingið undan sum uppskotsstillari til tann ringasta ørskapin. Enntá fleiri onnur taka undir við uppskoti hennara um at desavouera løgtingið og apa okkum eftir Íslandi og lata eina ”óhefta” nevnd áseta samsýningar og eftirlønir. (Annars áttu bæði politikkarar og onnur at komið burtur úr tí villfarilsinum at tala um ’óheftar’ nevndir. Tað er utopi.)

Sjálvt Høgni Hoydal, sum legði uppskotið fyri løgtingið, og sum er fremsti forsprákari fyri, at vit sjálvir skulu hava evsta vald og evstu ábyrgd, hevur nú longu mist álitið á aldargamla lóggevandi ting okkara og vil fáa staðfest í eina føroyska grundlóg, at ein óheft nevnd uttan fyri løgtingið skal taka sær av lønarviðurskiftunum hjá politikkarunum. Hetta er ein ómanslig roynd at flýggja undan ábyrgdini og at taka ræði frá tinginum.

Hvussu langt er tað haðani og til at øll lønarviðurskifti hjá føroyingum í einum komandi fullveldisríki verða at áseta av eini ”óheftari” nevnd?

Eg kann vera samdur við teimum, sum siga, at henda samgongan og serliga hetta landsstýrið ikki hevur verið ført fyri í øllum førum at gera eitt nøktandi lógfyrireikandi arbeiði. Tað sigur seg sjálvt, at tá ið so ómetaliga nógvar kreftir hava verið misbrúktar í einum so fánýtum og stuttskygdum arbeiði, sum fullveldispælið hevur verið, so hevur ikki nógv orka lopið av til álvarsligt uppbyggjandi og framhyggjandi arbeiði. Men Føroya Løgting er pr. definitión ført fyri at lóggeva við skili. ”Tað sum illa er yrkt, verður illa kvøðið”, verður sagt. Tá ið landsstýrið sendir eitt illa gjøgnumhugsað uppskot í tingið, so er ikki væntandi annað, enn at hundar og heykar leggjast á tað og gera sær dælt av tí.

Givið er, at tað er eitt serliga ótespiligt arbeiði at rudda upp eftir sær sjálvum, tá ið tamarhaldið hevur verið fokið og eingin verulig stýring er til. Men gerast má tað.

Tað eru nógv skilagóð fólk í landsumsitingini, sum hava allan førleika at gera uppskot til eina lóg, sum loysir spurningin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna.Tey eru har fyri at gera slík arbeiði. Sjálvandi ber tað til at gera eina rímiliga og rættvísa skipan, sum orðførararnir fyri politisku flokkarnar kunnu svara fyri, áðrenn málið verður lagt fyri tingið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Eru Føroyar á veg til eina ábyrgdarleysa diktaturloysing

**- har politisk maktgirnd, nationalistiskt trongskygni og erkvisni eru ráðandi?**

**Regin Eikhólm**
*Tórshavn 22/7-2001*



Eftir seinasta løgtingsval gjørdi loysingarsamgongan nógv burturúr tí fólkaræðisligu húgsjónini við íslendska loysingarleistinum sum fyrimynd, og bæði løgmaður og varaløgmaður undirstrikaðu tað neyðuga í, at Føroya fólk skuldi standa aftan fyri eitt møguligt nýskipanaruppskot.

Nú valskeiðið er um at vera liðið, er demokratiska intentiónin ikki vorðin til annað enn fagurlátaði orð, og í dag minnir fullveldisprosessini mest um eitt præludium ella forspæl til eina diktaturloysing, har fólkaræðisliga húgsjónin er útskift við loysing fyri loysingina skyld - kosta hvat tað kosta vil!

**Loysingin persónsfikserað**

Frá at vera eitt fólksins krav um neyðugar politiskar broytingar ella dagføring av ríkisfelagsskapinum er nýskipanarprosessin vorðin til persónsfikseraðan loysingarpolitikk hjá varaløgmanni uttan at hava fólkið aftan fyri seg. Devisan tykist vera: ”fælles fjende gør stærk”, men einvenda ákæran hjá varaløgmanni ímóti dønum er av somu skuffu, sum hvis føroyingar ákærdu bilverksmiðjurnar fyri tey mongu ferðsluóhappini í Føroyum. Tað eru hóast alt vit føroyingar sum stýra – bæði bilinum og í 80’árunum.

Hjá varaløgmanni eru føroyingar bert neyðugir statistar, fyri at hann kann realisera eina diktaturloysing uttan vanliga fólkaræðisliga framferð. Alt snakk um ”sakligheit” og ”fólksins rødd” er ikki annað enn kávalótir, sum tykjast fjala út yvir politiska maktgirnd. Við avlýstu fólkaatkvøðuna 26. maj stóð tað heilt klárt, at fólkaatkvøður, sum ikki frammanundan taka undir við loysing, verða avlýstar.

Trongdskygda nationalistiska framferðin hevur sátt spjaðing og illvilja bæði í Føroyum og í Danmark. Um endamálið hevur verið at fáa allar samráðingar at detta niðurfyri og einvegis at geva dønum skyldina, so hevur hetta lutvíst eydnast higartil, men allar súðir eru ikki syftar enn!

**Fullveldislogikkur og sjálvtekt**

Hóast fíggjarstøðan er kaotisk bæði innan eldraróktina og sjúkrahússektorin, so dikterar samgongan, at blokkstuðulin skal skerjast við 3-400 milliónum krónum næsta ár. Men sambært varaløgmanni so fara vit at klára okkum munandi betur aftaná! Deduktivt vil tað siga, at um vit lækkaðu lønirnar, so fingu fólk tað fíggjarliga meiri rúmsátt. Bert spell at varaløgmaður ikki greiddi Ingiborg, Ellinti og politikarunum annars frá hesum geniala ”fullveldislogikki”, tí so var als ikki neyðugt at hækka nakra løn, men heldur at lækka tær. Verkføllini saman við Brimla- / Teista málunum høvdu sostatt ongantíð sæð dagsins ljós, tí smb. ”fullveldislogikkinum” hjá Høgna Hoydal gevur minni peningur størri fíggjarligt rásarúm, skil tað hvør í vil?

Hesin ”fullveldislogikkur” er tó ikki galdandi fyri politikarar. Teir binda um heilan fingur – just in case - og játta sær sjálvum rekord lønarhækkan og óhoyrda eftirlønarskipan við 50 ára afturvirkandi

kraft svarandi til 1-2 verkamannalønir ella 5-6 ferðir so nógv sum vanligir pensionistar fáa, uttan at hava goldið eitt klovið oyra í pensiónskassan.

Tá Palliba síðsta ár fekk lovað pensiónsískoyti, var einki at fáa, men undan summarfrítíðini tók tað løgtinginum minni enn 5 minuttir at avgreiða hundraðtals milliónir krónur til landsstýrismanna eftirlønir við útliti til tað sama fyri løgtingsmenn - segði nakar sjálvtekt?

Fyri 200 árum síðani ákærir Nólsoyar-Páll í Fuglakvæðum danskt stýrdu embætismennirnar fyri bert at hugsa um seg sjálvar: ”Kjógvi við sítt klipta ve/, hugsar við sjálvum sær:/”Vertin á, hvat annar fær; eg skal nøra mær.” Føroysku politikararnir kunnu takka skaparanum fyri, at Nólsoyar-Páll í dag stendur fastboltaður niðri í Vágsbotni!

**Diktatoriskar loysingar ílegur**

Vit kenna gongdina aftur frá søguni har ”målet helliger midlet”. Diktatorisku ílegurnar, sum kommunistarnir og ikki minst nationalsosialistarnir eru ræðandi umboð fyri, syrgdu altíð væl fyri sær sjálvum. Teir søgdu seg tæna fólkinum, men søgan lærir okkum annað.

Ábendingar um diktoriskar loysingar ílegur finnast eisini her hjá okkum. Í nýggja loysingarblaðnum, Fregnir, verða longu nú søguligar keldur selektivt valdar burturúr og snikkaðar til, soleiðis at søguhamurin undirbyggir loysingina, samstundis sum niðrandi nøvn verða sett á sjálvt deyðar samríkis sinnaðar politikarar, smb. søgufrøðinginum Kristin Vestergaard (Dimmalætting 14/7-01). Harumframt verður eisini roynt at politiserað t.d. konsertir við nýfiknum ungdómi og tann málsliga antidanska purisman verður eisini brúkt.

Eisini eru ræðandi dømir um ”ariska” loysingaratferð, sum tá Føroya fólk upplivdi at maritimi mentamálaráðharran vísti fólki durafjórðingin, tí viðkomandi ikki tosaði ”ariskt føroyskt”. Okkara kendasti rithøvundur og heiðursborgari í Havn er eisini fallin fyri ikki at hava skrivað ”ariskt føroyskt”, og verður nú eftir sín deyða hóttir við eksklusión í sínum egna landi – hann sum annars var ein av okkara fáu intellektuellu slóvarum, ið gjørdist kendur uttan fyri eingjagarðarnar. Um hetta bert er ein einlig viðmerking ella ein meiri organiserað ”Hesuferð”, vil tíðin vísa, men sporene skræmmer!

**Nationalistiskt erkvisni íblást av kvennleggi?**

Eitt áhugavert fyribrigdi í Føroyum er tað ofta afturvendandi nationalistiska trongdskygni og erkvisni. Hetta fyribrigdi sæst ofta í umhvørvi har føroyingur giftur seg donskum kvennleggi og er sjálvur kanska ikki nóg búgvin til at taka ímóti tí meiri rúmsáttu donsku kontinentalmentanini, sum danski kvennleggurin náttúrliga byggir sín samleika á.

Hjá fleiri sampakkar tó sera væl og gevandi, men hjá øðrum verður eitt mentannar skisma ímillum okkara oyggjamentan og rúmsáttu donsku kontinentalmentanina. Klinisku symptomini – serliga í kalllegg - kunnu vera alt frá danafobi til islandofili, við trongd til nationalistiskt at yvirkompensera og at draga føroyskt frammum sum tað einasta rætta. Tilsvarandi verður tað danska distansera og niðurgjørt.

Hetta forklárar kanska lutvíst hví verandi loysingarprosess í alt ov stóran mun byggir á tað emotionella heldur enn á tað rationella við reellum fólkavilja aftanfyri?

**Trúfastur altíð var maður…**

Rasmus C. Effersøe, hvørs standmynd í mong ár á grótsoylu hevur prýtt Tinghúsvøllin, yrkti at: ”Trúfastur altíð var maður, vildi ei bróta sítt orð ..”, og so leingi hann stendur har sum eitt kennimerki, áttu politikarar at lagt sær orð hansara í geyma, til gavns fyri politiska trúvirðið.

Vanliga trúgva fólk bert uppá jólamannin í desember, men nógvar ”nissur” tykjast búgva í Føroyum og Danmark árið runt! Nationalistiskt trongskygni og erkvisni saman við politiskari maktgirnd verður ongantíð haldgóður føroyskur samleiki hóast dagliga innpakkaður í uniformerað kota-líki!

Ein stórur partur av føroyingum hevur als ongan trupulleika við sín samleika og rættindi sum danskur statsborgari, tað síggja vit eina best av teimum mongu føroyingum, sum fáa sær EU-pass!

Okkara 600 ára gamli ríkisfelagsskapur er nógv annað enn blokkstuðul, og tí er loysing ella ikki loysing eitt alt ov stórt og viðkomandi mál fyri Føroyar og Danmark at lata upp í hendurnar á einum ungum óroyndum politikara at ”loysa” mestsum einsamallur. Tað finst nevniliga annað enn svart og hvítt. Vit hava ein heilan ælaboga av litsamansetingum - eisini í politikki.

Vantandi politisku royndirnar hjá varaløgmanni vísa seg týðuliga í kollsigldum samráðingum og ábyrgdarleysari diktaturloysingar framferð, sum alt færri taka í álvara.

Føroyar hava nú meir enn nakrantíð brúk fyri realpolitikarum, sum ikki spæla poker um vælferð og persónliga frælsi føroyinga.

# Frítíðarlóggávan?

**Hans Birgir Hansen**

Eg vil alment heita á Mentamálastýrið um at fáa endurskoðað Frítíðarlóggávuna frá sjeytiárunum viðvíkjandi bygdar- og ungdómshúsum kring alt landið!

Tað sama er við atliti til játtanir, sum F.U.R. hevur fingið frá sjeytiárunum, ið verður býttur millum frítíðarfeløg, politisk ungmannafeløg eftir býtislykli.

Eg vil alment heita á Mentamálastýrið um at fáa kannað játtanir til bygging av bygdar- og ungdómshúsum kring alt landi frá sjeytiárunum sum skjótast!

Eg hevði skriv til landsstýrið hesum viðv. í 1974, sum løgmaður Atli P. Dam tók við í ólavsøkurøðu sína undir skúlaskap, ungdóms- og mentanarmál!

Eg vil alment heita á Almanna- og Heilsumálastýrið um at fáa endurskoðað rúsdrekkalógina og tubbakslógina og fáa strangari eftirlit við sølu!

Eg vil alment mæla til at handlar og kioskir fáa forboð at selja øl og sigarettir til børn, ungdómar undir 18 ára aldur kring alt landið!

Tað er upp á tíðina at fáa løgregluna at hava eftirlit við rullandi barrum á fýra hjólum hvørt vikuskifti, tá dansur verður skipaður!

Eg haldi, at landspolitikarar skuldu tikið hesar lóggávur upp til viðgerðar í løgtingi og fingið tær endurskoðað-ar/dagførdar sum skjótast!

Eg vil vísa til bjarging av mannalívi, fáa vit økt eftirlitið á føroyskum vegum til og frá dansihølum í vikuskiftum sum skjótast!

Eg vil siga, at tilkomin, ið lata ella keypa øl og tubbak til børn, ungdómar undir 18 ár, skulu revsast við bótum!

Eg haldi, at øll foreldur skuldu tosað álvarsamt við síni børn og fingið hesi at gevast at drekka og roykja!

# Hvør fær hvat?

**Ása Olsen**



Eg eri sjálv ein av teimum fakfelagsleiðarum, ið havi verið til sáttmálasamráðingar nú í summar. Tá Starvsmannafelagið skrivaði undir sín sáttmála við Fíggjarmálastýrið í vár, vóru tað ikki so fáir tinglimir ið átalaðu hesa lønarhækkan. Fleiri av tinglimunum ákærdu Kartin Hansen fyri at nýta hesa lønarhækkan sum valagn osfr.

Lítið visti eg og aðrir fakfelagsleiðarar um tann trumf, hesi somu tingfólk høvdu í lummanum til sín egna fyrimun.

Nú kjakið av álvara hevur tikið seg upp um pensiónina hjá landsstýrisfólkum, so átti tað at verið bæði rætt og rímuligt, at bæði løgtings og landstýrisfólk fáa eina eftirløn, á sama hátt sum vanligi løntakarin, og ikki bara sum eitt eyka bonus omaná eina lønarhækking uppá 60% í 99.

Tað er hugstoytt at sanna, hvussu teir tinglimir, ið ikki untu palleba eina lønarhækking uppá umleið 12% í miðal yvir 2 ár og 7 mánar, nú hava lóggivið sær sjálvum tað teir hava hug til, ella er tað ikki so?

Um ikki fólk høvdu gjørt vart við seg hesuferð, var so málið sent niðan aftur í tingið? Nei og aftur nei.

Hesir løgtingslimir, ið vóru valdir inn á ting í 1998 koma at fara í søguna sum teir, ið høvdu størst umsorgan fyri sínum egna búki enn nakar annar.

Nógvar útmeldingar hava verið hesum máli viðv. men tað skert ikki burtur, at málið kom ígjøgnum í tinginum uttan nakað hóvasták. Tó hava tingfólk eina tøkk uppiborna, ið ikki atkvøddu fyri uppskotinum.

Eftir at hava lisið bløðini leygardagin og sæð hvat hendan eftirlønin kostar, so kundi eg ikki lata vera við at hugsa, tonk um Heimarøktin hevði fingð ein lítlan part av hesum peningi-.

Hettar eru jú tey tingfólk, ið við vallyftum gjørdu seg til talsmann fyri tey sjúku og veiku. Nú summar fáa tey gomlu onga reingerð, tí ongin peningur er.